# Áttu at gingið plankan út

*Skála breyt í fjør miðsavnandi mynstrið, sum annars hevur teknað seg seinnu árini. Men sum eitt lítið felag við tunnum hópi mistu teir luftina, sum árið leið. Júst hesin veikleikin hjá smærru feløgunum verður helst størri við nýggja kappingarleistinum*



**Tá landskappingin varð víðkað, skuldi stigið verið tikið heilt út, soleiðis at kappingin verður skipað sum heyst- og várhálva. Verandi broyting kann í ringasta føri elva til kaos á fleiri økjum**

**Landskappingin**
*Jákup Mørk*

Nakað, sum líktist einum orðaskifti, tók seg upp í fjølmiðlunum tíðliga í ár, tá formaðurin í kappingarnevndini, Bjarki Mohr, gav til kennar, at ætlanin nú var at umskipað landskappingina, soleiðis at hon framyvir kemur at fevna um 27 umfør. Samstundis skuldi steypakappingin umleggjast, soleiðis at hon aftur verður koyrd eftir cup-skipanini heldur enn við bólkaspælinum, sum hevur verið galdandi seinnu árini.

## Ikki ókent

Ikki tí. Tankarnir hjá Bjarka vóru ikki so spildurnýggir, sum summi kanska vildu gera teir til, tá orðaskiftið tók seg upp stutt undan aðalfundinum hjá FSF. Longu í byrjanini av september mánaði, tá landsliðið leikti útidyst móti Sveis, málbar kappingarstjórin seg soleiðis í viðtali við Sosialin: »Mín hugsan er í øllum førum, at vit umløgdu kappingina, soleiðis at øll lið hittust tríggjar ferðir um árið. Síðani kundi steypakappingin eisini verið umløgd, so vit aftur spældu eftir cup-skipanini«.

Sum grundarlag fyri hesum nevndi Bjarki, at hetta fór at geva leikarunum fleiri intensar dystir, eins og eitt longt kappingarár hevði tað positivu avleiðing, at leikararnir ikki hava fimm mánaðir frí frá fótbóltinum, soleiðis sum tað oftani hevur verið galdandi áður.

Greið tala, og tað var eisini hesin leistur, sum varð nýttur, tá broytta kappingin so varð fráboðað á aðalfundinum hjá FSF.

## Miðsavnan verður kortini

Ivaleyst hevur nakað av tingingum gingið fyri seg handan leiktjøldini síðani tá, men í januar mánaði komu reaktiónir frá Peturi Simonsen, fótbóltsvenjara, og Finni Helmsdal, ítróttarskrivara á Oyggjatíðindi um málið.

Báðir tveir vístu teir á fleiri avleiðingar av ætlaðu broytingunum. Og felags niðurstøðan tóktist vera, at hetta fór at viðføra eina enn størri miðsavnan enn hana, sum vit longu hava sæð seinastu 15-20 árini.

Nú skal yvirritaði ikki hella meira av bensini á nakað bál, men tað kann væl vera, at teir báðir viðmerkjararnir hava rætt í sínum fatanum. Men fyri nøkur av argumentunum er tó galdandi, at miðsavnanin kortini kemur. Ikki minst, tá øktu fyrisitingarligu krøvini fara at køva nøkur av smærru feløgunum. Júst tann parturin hevur tó einki við eina umlagda kapping at gera, tí her er talan um UEFA krøv, sum kortini skulu fylgjast. Og hvørt vit vilja tað ella, so eru eingi útlit til, at miðsavnanin ikki vindur uppá seg. Kanska vilja nýggju UEFA-reglurnar um, at ávísur partur av leikarunum skulu vera uppaldir í felagnum, broyta hetta upp á sikt.

## Tambað ov nógv

Somuleiðis varð staðfest, at onnur avleiðing av longdu kappingini fór at verða økt krøv til breiddina hjá einstøku feløgunum. Við longdari kapping fáa skaðar og leikbann helst ein enn størri leiklut, enn tey higartil hava havt, og at hetta kanska serliga fór at raka smærru feløgini, har hópurin ikki var so stórur.

Tað er rætt, at talið av dystum økist. Men hinvegin er talan ikki um so ógvusliga øking, sum tað av summum verður lagt upp til. HB, sum í fjør vann greipuna, leikti íalt 28 dystir í heimligu kappingunum. 18 í lands- og 10 í steypakappingini. Tað talið vildi eftir nýggju skipanini bara verið fýra dystir hægri. Men við samansetingini, 27/5.

Men tað er óheppið, at kappingin eftir nýggja leistinum verður tambað til at fevna um so stóran part av árinum, sum hon nú ger. Talan verður at kalla um fótbólt uttan íhald frá januar mánaði til seinast í oktober, og tað kann raka meint. Partvíst økjast útreiðslur til venjarar og leikarar, men tað kann kanska partvíst verjast, nú feløgini fáa fleiri áskoðarainntøkur.

Verri er, at leikarar rætt og slætt kunnu troyttast av fótbóltinum, tí teir snøgt sagt ongantíð hava frí. Sjálvur segði Bjarki Mohr, at eitt endamál við broytingini var, at steðgurin skuldi minkast, men hetta kundi eisini verið gjørt á annan hátt, enn bara at leingja kappingina. Til dømis við at leggja um til eina heyst-/vár kapping.

## Meira mennandi

Tí í sjálvum sær er økta dystartalið eingin bági. Heldur tvørturímóti. Saman við broyttu steypakappingini vil hetta hava við sær, at talan í mesta lagi verður um 32